


# Mjørkadalsmenn bjóða til gongutúr

Hermenninir í Mjørkadali bjóða øllum føroyingum at ganga túr við sær Kristi himmalfarsdag.

Hetta er ein gongutúrur, sum byrjar við Keypsamtøkuna í Hoyvík og síðani verða 15 kilometrar gingnir niðan í Mjørkadal.

Hóast túrurin verður kallaður Færø March, so er talan um ein hugnaligan gongutúr, sum Mjørkedals Idretsforening skipar fyri.

Fyrstu fer hesin túrur varð gingin, var í 1976, og í fjør luttóku 40 fólk á túrinum. Bara eina ferð hevur túrurin verið avlýstur, og tað var vegna veður.

Tað kostar onki at vera við, og ávegis niðan ber til at keypa okkurt smátt, meðan tað verður møguleiki at keypa sær ein heitan bita uppi í Mjørkadali.

## Suðuroyar Sparikassi lækkar rentuna

Suðuroyar Sparikassi fylgir nú hinum peningastovnunum og lækkar sína inn- og útlánsrentu.

Eftir at Tjóðbankin tann 7. mai lækkaði leiðandi rentuna, boðaði fyrst Føroya Banki og síðani Eik Banki frá, at teir lækkaðu sína rentu, og í tíðindaskrivi í gjár boðaði Suðuroyar Sparikassi so frá, at teir gera tað sama.

Inn- og útlánsrenturnar lækka við 0,60 prosentstigum. Lægsta bústaðarrentan lækkar 0,35 prosentstig og fer úr 6,05% niður í 5,70% p.a.

Rentan á vanligari kontu verður framvegis 0,25%.

# Atlantsflog góðan ársfjórðing

**Úrslitið hjá Atlantic Airways fyrsta ársfjórðing í ár var 14 milliónir krónur fyri8 skatt samanborið við 2,5 milliónir krónur í halli fyrsta ársfjórðing í fjør**

TÍÐINDASKRIV



Fyrsti ársfjórðingur hjá Atlantic Airways hildnaðist sera væl. Grundraksturin var heldur betur, hóast umsetningurin fall. Úrslitið áðrennavskrivingar, leasingútreiðslur og fíggjarligar postar (EBITDAR) var 15,2 milliónir krónur fyrsta ársfjórðing í ár samanborið við 12,6 milliónir somu tíð í fjør.

Fíggjarinntøkurnar góvu serliga gott íkast til úrslitið, tí felagið í februar í ár staðfesti ein stóran vinning í sambandi við sølu av valutatrygging. Netto fíggjarligu inntøkurnar vóru 15,7 milliónir krónur í mun til 0,8 milliónir somu tíð í fjør.

Flogførini flugu meira í leiguflúgving fyrsta ársfjórðing í ár enn í fjør, men kortini færri tímar enn fjórða ársfjórðing í 2008. Ferðafólkatalið á rutunetinum, sum er størsti parturin av flúgvingini, er hinvegin minkað 8% fyrstu fýra mánaðirnar í ár samanborið við í fjør.

Umsetningurin hjá Atlantic Airways var 101 milliónir krónur fyrsta ársfjórðing í ár samanborið við 112 milliónir krónur somu tíð í fjør. Flúgvikostnaðurin minkaði úr 77 milliónum krónum niður í 63 milliónir krónur.

Gjaldførið hjá felagnum er sera gott. Felagið hevur tilvitað virkað fyri at økja um tøka peningin, nú fíggjarkreppa ger sum seg, og tøki peningurin øktist frá 31. desember 2008 til 31. mars 2009 úr 82 milliónum krónum upp í 110 milliónir krónur.

Eginognin hjá felagnum er 236 milliónir krónur og solvensprosentið er 51. Fíggjarstøðan javnvigaði 31. mars 2009 við 436 milliónum krónum.

Minkandi ferðafólkatalið og fallandi áhugi at leiga flogfør og tyrlur til tænastur uttanlands og í Føroyum fara at síggjast aftur í rakstrinum hjá felagnum. Atlantic Airways væntar ein lakari grundrakstur fyri alt árið 2009, men hægri fíggjarinntøkur.

Vit ylgja gongdini neyvt bæði úti og heima og laga okkum til skiftandi umstøður so væl og skjótt sum tilber. Vit vænta minni flúgving í ár enn undanfarin ár – bæði við tyrlum og flogførum – og eru farin at repa seglini, men tað er eisini umráðandi at standa tilbúgvin, tá nýggjar avbjóðingar stinga seg upp, sigur Magni Arge.

Roknskaparhátturin hjá felagnum er broyttur, so felagið nú fylgir nýggju IFRS-ásetingunum. Broytti roknskaparhátturin hevur við sær, at óstaðfestur kursvinningur/tap upp á partabrøv verður javnaður yvir eginognina og ikki yvir raksturin.